# Føroysk fólkanavnagáva síðstu fjórðingsøld

*Anfinnur Johansen*
lektari

Føroyamálsdeildin
Fróðskaparsetur Føroya

Navnalóggáva

Fornøvn

Millumnøvn

Eftirnøvn

# Fólkanavnalóggáva

**1.** Løgtingslóg nr. 142 frá 8. oktober 1992 um fólkanøvn.

**2.** Løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn.

**3.** Løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn, sum broytt við løgtinslóg nr. 33 frá 30. apríl 2007.

## Løgtingslóg nr. 142 frá 8. oktober 1992 um fólkanøvn

**§ 1**. Hvørt barn skal fáa navn áðrenn tað er 6 mánaðir gamalt.

Stk. 2. Eingin skal hava fleiri enn tvey fornøvn.

Stk. 3. Navnið skal vera í samljóði við føroyskar málreglur.

**§ 4.** Eittans millumnavn kann verða givið sum millumnavn. Millumnavnið kann ikki verða bundið at eftirnavni við bindistriku. Millumnavnið kann vera millumnavnið hjá faðir ella móður ella eitt navn, sum barnið kann fáa sum eftirnavn.

**§ 6.** Afturat fornavni skal hvørt barn fáa eftirnavn.

**Stk. 2.** Eftirnavn kann vera

1) ættarnavn faðirs ella móður

2) ættarnavn, sum annað av foreldrunum seinast hevur borið, og sum ikki er fingið við giftu.

**Stk. 3.** Ístaðin fyri ættarnavn kann eftirnavnið hjá barninum vera fornavn faðirs ella móður í hvørsfalli við -*son* ella -*dóttir* aftrat í samsvari við kyn barnsins. Er navn faðirs ella móður tvínevni, verður bert annað navnið nýtt í hesum føri.

Í 1832 kom ein skipan í gildi í Føroyum – hon kom í gildi í Danmark 30. mai 1828, sum nevndist:

”om adskilligt, som i Henseende til Daaben bliver at iagttage”.

Í 18. og síðstu grein í hesi fyriskipan stendur:

”Iøvrigt bør hvert Barn ved Daaben benævnes ej alene med Fornavn, men og med det Familie- eller Stamnavn, som det i Fremtiden bør bære.”

Tá gjørdust hesi faðirsnøvnini við -*sen* føst eftirnøvn, og faðirsnøvn við -*datter* vórðu eisini avtikin, t.e. at genta skuldi verða sonur faðirs síns.

Lóg nr. 89 frá 22. apríl 1904 “om navnaforandring”.

## 2. Løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn.

**§ 1.** Hvørt barn skal við dópi ella navnagávu fáa navn, áðrenn tað er 6 mánaðir gamalt.

*stk. 2.* Eingin skal hava fleiri enn trý fornøvn, eitt millumnavn og eitt eftirnavn. Nøvn kunnu ikki verða bundin hvørt at øðrum við bindistriku.

**§ 2.** Sum fornøvn verða ikki viðurkend nøvn, sum ikki av røttum eru fornøvn, og onnur nøvn, ið kunnu haldast at verða fólki til ampa.

*Stk. 2.* Navnið skal vera í samljóði við føroyskar málreglur.

*Stk. 4.* Navnanevndin kann eftir umsókn gera undantak frá stk. 2, tá ið uppkallað verður eftir fólki í ættini. Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri reglur um undantøk.

*Stk. 5.* Tá ið mett verður, um undantak kann verða givið til uppkalling, skal dentur verða lagdur á, at navnið í høvuðsheitum líkist navninum á tí, ið kallað verður upp eftir. Í hesum sambandi skal atlit havast at:

1) navnafrøðiliga upprunanum,
2) stavsetingini og
3) framburðinum av navninum, ið søkt verður um.

*Stk. 6.* Uppkalling í ættini verður avmarkað til, at tann, ið kallað verður upp eftir, er:

1) systkin hjá barninum,
2) foreldur, omma ella abbi, langomma ella langabbi,
3) systkin hjá foreldrum,
4) systkinabarn, ella
5) ommu- ella abbasystir, ommu- ella abbabeiggi.

*Stk. 7.* Fyri hvørt navnið, ið givið verður, kann bara verða kallað upp eftir einum navni.

**3.** Løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn, sum broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 30. apíl 2007.

# Navnagáva 16.10.1992 - 31.12.2017

- 8503 dreingir + 8182 gentur = 16685 børn

| | | |
|---|---|---|
| dreingir | 2 nøvn: 1758 | 3 nøvn: 34 |
| gentur | 2 nøvn: 1686 | 3 nøvn: 26 |
| | 3444 | 60 |

| | | |
|---|---|---|
| dreingir | 8503 + 1758 + 34 = 10295 | heildarnøvn |
| gentur | 8182 + 1686 + 26 = 9894 | - ” - |
| | heildarnøvn til samans 20189 | |

1792 dreingir fleiri enn 1 fornavn: 21,1%

1712 gentur fleiri enn 1 fornavn: 21,0%

# Tey 10 vanligastu dreingjanøvnini í tíðarskeiðinum 1992-2017

1. Jákup 264
2. Jóhan 193
3. Petur 183
4. Martin 162
5. Hans 156
   Kristian 156
6. Dánjal 155
7. Jógvan 149
8. Dávid 134
9. Fríði 133
10. Andrias 130 1814 17,6%

# 1801, 1851-1855, 1951-1955, 1994, 1992-2017

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1. Jógvan | 1. Jákup | 1. Jákup | 1. Jákup | 1. Jákup |
| 2. Jákup | 2. Jógvan | 2. Petur | 2. Hans | 2. Jóhan |
| 3. Óli | 3. Hans | 3. Hans | 3. Jógvan | 3. Petur |
| 4. Hans | 4. Petur | 4. Martin | 4. Petur | 4. Martin |
| 5. Jóhannes | 5. Jóhannes | 5. Jóhan | 5. Jóhan | 5. Hans |
| 6. Poul | 6. Óli | 6. Kristian | 6. Martin | 6. Dánjal |
| 7. Petur | 7. Jóhan | 7. Poul | 7. Kristian | 7. Jógvan |
| 8. Dánjal | 8. Frederik | 8. Jógvan | 8. Poul | 8. Fríði |
| 9. Mikkjal | 9. Pauli | 9. Súni | 9. Jóhannes | 9. Andrias |
| 10. Tummas | 10. Andrias | 10. Jóhannes | 10. Pauli | 10. Kristian |
| 1759 | 502 | 10. Pauli | 7158 | 1814 |
| 63,3% | 55,7% | 765 | 15,7% | 17,6% |
| | | 25,1% | | |

# Tey 10 vanligastu gentunøvnini í tíðarskeiðinum 1992-2017

1. Maria 424
2. Anna 203
3. Sára 144
4. Rebekka 142
5. Kristina 140
6. Sofía 138
7. Jóhanna 130
8. Eva 111
9. Vár 106
10. Fríða 104 1642 16,6%

# 1801, 1851-1855, 1951-1955, 1994, 1992-2017

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1. Anna | 1. Maria | 1. Maria | 1. Maria | 1. Maria |
| 2. Katrina | 2. Anna | 2. Anna | 2. Anna | 2. Anna |
| 3. Marin | 3. Sofía | 3. Jóhanna | 3. Jóhanna | 3. Kristina |
| 4. Elsubet | 4. Katrina | 4. Elisabet | 4. Sofía | 4. Rebekka |
| 5. Malena | 5. Malena | 5. Sofía | 5. Elisabet | 5. Sára |
| 6. Sunniva | 6. Súsanna | 6. Kristina | 6. Súsanna | 6. Jóhanna |
| 7. Súsanna | 7. Elsubet | 7. Súsanna | 7. Kristina | 7. Elisabet |
| 8. Maria | 8. Frederikka | 8. Katrina | 8. Katrina | 8. Rannvá |
| 9. Sofía | 9. Jóhanna | 8. Marjun | 9. Katrin | 9. Súsanna |
| 10. Sigga | 10. Elisabet | 9. Marita | 10. Elsa | 10. Fríða |
| 2327 | 10. Marin | 10. Jórun | 5788 | 10. Rakul |
| 74,8% | 725 | 10. Katrin | 12,9% | 1079 |
| | 67,9% | 695 | | 19,1% |
| | | 23,5% | | |

# Børn á Glyvrum, Saltangará og Runavík fødd í tíðarskeiðinum 1992-2017

Glyvrar: 152 børn, 75 dreingir og 77 gentur

Jákup 2+2 = 4 Maria 2+2 = 4

Saltangará: 302 børn, 149 dreingir og 153 gentur

Jákup 3+1 Maria 3+2 = 5

Jacob (1) = 5

Runavík: 165 børn, 74 dreingir og 91 gentur

Jóhan 1 Maria 1+4 = 5

Jóhann 2+1 = 4

# Navnauppruni

Kirkjulig nøvn: 10619 - 52,6%

Nøvn av norrønum uppruna: 7178 - 35,6%

**88,2%**

Nøvn av týskum uppruna: 3,2%

Nøvn av enskum uppruna: 1,6%

***Gamla testamenti***

Gideon: Hin fimti av dómarum Ísraels, sum vit lesa um í Dómarabókini.

Mika: sum er navn á fleiri monnum í Bíbliuni, t.d. Mika profetur.

Hadassa: Jødiska navnið á Ester drotning, sum vit lesa um í Esterarbók 2,7.

Jemima: Elsta dóttir Jobs, av teimum, sum hann fekk aftan á vanlukk-una. Job 42,14.

Kesia: Ein av døtrum Jobs, sum vit lesa um í Jobsbók 42,14.

Ketura: Hjákona Ábrahams, sum hann átti 6 synir við, hana lesa vit um í 1. Mósebók.

***Nýggja testamenti***

Feliks: Rómverskur landshøvdingi í Júdea, um 52 til 60 e.Kr. Vit kenna hann frá Áp. kap. 23 og 24. Hann hevði Paulus í fangahúsi í Kasarea í tvey ár, tí hann hevði væntað at fáa loysipening fyri hann.

Natanael: Ein av Jesu lærusveinum, helst best kendur við eftirnavninum Bartolomeus.

Tabita: Vit lesa um hana í Ápostlasøguni 9, 36-43, har sagt er frá, at hon doyði, og at Pætur vakti hana aftur til lívs.

# Millumnøvn

**1992-2017**

7338 børn bera millumnavn

3726 dreingir (43,8%)

3612 gentur (44,2%)

t.e. 44, % bera millumnavn

## Tíðarskeiðið 1951-55

- 1902 dreingir – 324 mn. = 17%
- 1875 gentur – 253 mn. = 13,5%
- 3777 børn – 577 mn. = 15,3%

# Millumnøvn (framh.)

- 3138 børn, t.e. 18,8%, hava fornavn faðirs ella móður við -son ella -dóttir
- 2982 børn, t.e. 17,9%, hava fornavn faðirs + -son ella -dóttir
  - 1458 dreingir, t.e. 17,2%, hava fornavn faðirs + -son
  - 1524 gentur, t.e. 18,2%, hava hava faðirs + -dóttir
- 156 børn, t.e. 0,9%, hava fornavn móður + -son ella dóttir
  - 54 dreingir, t.e. 0,6%, hava fornavn móður + -son
  - 102 gentur, t.e. 1,3%, hava fornavn móður + -dóttir

# Millumnøvn (framh.)

- 730 børn (400 dreingir (4,7%) og 330 gentur (4,0%)), t.e. 4,4%, hava millumnavn faðirs sum sítt millumnavn
- 1420 børn (739 dreingir (8,7%) og 681 gentur (8,3%)), t.e. 8,5%, hava millumnavn móður sum sítt millumnavn
- 241 børn (125 dreingir (1,5%) og 116 gentur (1,4)), t.e. 1,4%, hava eftirnavn faðirs sum sítt millumnavn
- 1317 børn (712 dreingir (8,4%) og 605 gentur (7,4%)), t.e. 8,2%, hava eftirnavn móður sum sítt millumnavn

# Eftirnøvn
## 1992-2017

- 1887 børn, t.e. 11,3%, hava hava fornavn faðirs ella móður við -son ella -dóttir
- 1815 børn, t.e. 10,9% hava fornavn faðirs + -son/-dóttir
  - 910 dreingir, t.e. 10,7, hava fornavn faðirs + -son
  - 905 gentur, t.e. 11,1%, hava fornavn faðirs + -dóttir
- 72 børn, t.e. 0,4%, hava fornavn móður + -són/-dóttir
  - 26 dreingir, t.e. 0,3%, hava fornavn móður + -son
  - 46 gentur, t.e. 0,6%, hava fornavn móður + -dóttir

# Eftirnøvn (framh.)

- 6231 børn (3104 dreingir (36,5%) og 3127 gentur (38,2%)), t.e. 37,4%, hava sama eftirnavn sum foreldrini
- 5671 børn (2989 dreingir (35,2%) og 2682 gentur (32,8%)), t.e. 34,0%, hava eftirnavn faðirs
- 2766 børn (1404 dreingir (16,5%) og 1362 gentur (16,7%)), t.e. 16,6%, hava eftirnavn móður
- 6 børn hava gentueftirnavn móður sum sítt eftirnavnn

# Hjúnanøvn

- 16.10.92 til 31.12.17 vóru tað 4968 vígslur
  - 1495 kvinnur, t.e. 30,1%, varðveittu sítt egna eftirnavn eftir vígslu
  - 4790 menn, t.e. 96,4%, varðveittu sítt egna eftirnavn eftir vígslu
  - 3342 kvinnur, t.e. 62,3%, tóku eftirnavnið hjá manninum eftir vígslu
  - 61 menn, t.e. 1,2%, tóku eftirnavnið hjá konuni eftir vígslu

# Takk fyri

# Navnið Meinhard

Mainar
Mainard
Mainer
Mainert
Mainhard
Mainhardt
Mainhart
Majnard
Majner
Majnert

Majnhard
Meinar
Meinard
Meinart
Meinarth
Meiner
Meinert
Meinerth
Meinhard
Meinhardt

Meinhart
Mejnar
Mejnard
Mejnart
Mejnert
Mejnhard
Mejnhardt
Meynard
Meynhardt

**29 ymiskir stavingarhættir**

# Navnanýgerðir - dreingir

Finnfríði
Hallfríður
Mækir
Óðin
Sproti
Treysti
Týrur
Ægir

Melkjor
Milan
Móses
Natan
Nóa
Set
Sirius
Roði

# Navnanýgerðir – gentur

Brá
Brima
Børka
Eira
Embla
Fljóða
Flykra
Froya
Følva
Geira

Glæma
Gylta
Ingibjørt
Maisól
Narvør
Royða
Rún
Súnbjørt
Yngva

Felisia
Maika
Navarana
Ranja
Saranja
Tara